Rúni M. Hansen, landastjóri fyri Grønland og Føroyar hjá Statoil. (Mynd: Ole Jørgen Bratland/Statoil)

Rúni M. Hansen: Taka øll fyrilit í Grønlandi

Jan Müller

21.12.2013 - 22:32

Oljan.fo

Statoil hevur saman við ConocoPhillips og Nunaoil fingið tillutað eitt loyvi í Eysturgrønlandi, har Statoil er fyristøðufelag. Talan er um teig 6 út fyri strondina í norðara partinum av Eysturgrønlandi. Talan er um eitt øki, sum enn er lítið og einki kannað. Statoil eigur 52,5%, ConocoPhillips 35% og NunaOil eigur 12,5 av loyvinum.

“Vit hava verið í Grønlandi síðani endan av 1980-unum, og vit hava alla tíðina ment royndir og forstáilsi. Vit arbeiða miðvíst við okkara ætlanum í Arktis, sum byggja á 30 ára royndir frá truplum veðurviðurskiftum á norska landgrunninum og øðrum arktiskum og subarktiskum umráðum.

At fáa hetta nýggja loyvið inn í okkara loyvisskrá er ein partur av okkara langtíðar virkisætlan í Arktis. Menning av nýggjari tøkni er avgjørt ein fortreyt fyri framtíðar

virksemi í hesum loyvinum," sigur stjórin fyri leiting í Grønlandi og Føroyum hjá Statoil, Rúni M. Hansen við heimasíðuna hjá Statoil.

Loyvið, sum talan er um, er fyri 16 ár. Fyrsti parturin av arbeiðinum fevnir um at fáa til vega seismikk. Tá hetta er gjørt verður støða tikin til, hvat víðari skal henda.

Statoil hevur annars staðið fyri bæði kjarnuboringum og vísindaligum arbeiði í hesum økinum fyrr fyri betur at kunna skilja serstøku arbeiðsviðurskiftini har.

"Vit síggja, at her er talan um eitt sera avbjóðandi øki, men eisini eitt øki, sum kann goyma nógvar møguleikar fyri olju og gassi. Tað er eisini okkara fatan, at tilfeingið í Arktis fer at fáa stóran týdning í royndunum at nøkta heimsins orkutørv. Av tí at hetta er eitt lítið kannað øki, er eisini talan um eina langtíðar verkætlan hjá Statoil. Vit fara at arbeiða miðvíst við hesum og ikki skunda okkum meira enn tøknin loyvir tí," sigur Rúni M. Hansen og leggur aftrat, at Statoil fer at taka øll hugsandi fyrilit.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Statoil er virkið í Grønlandi. Ì 1990-unum boraði Statoil ein brunn á Fyllaøkinum í Vesturgrønlandi men lat aftur loyvið í 2002. Statoil er eisini partnari í trimum loyvum í Vesturgrønlandi, Anu, Napu og Pitu, sum øll liggja í Baffinvíkini. Her arbeiðir felagið saman við Shell, GDF Suez, Cairn og NunaOil. Í 2012 keypti Statoil seg inn í eitt av loyvunum hjá Cairn, sum tá hevði borað fleiri brunnar í Vesturgrønlandi og brúkt 6-7 mia. kr. – uttan at geva nakað úrslit. Umframt Cairn er Shell fyristøðufelag í hinum báðum loyvunum.

Annars arbeiðir Statoil longu í fleiri arktiskum økjum við stórum avbjóðingum, so sum í Norra, Russlandi, USA og Kanada.